## Crawling Blue á Youtube



Crawling Blue hevur lagt eina LIVE upptøku av vælumtókta lagnum The Well út á Youtube, og eftir ætlan verður upptøkan eisini útgivin á DVD seinni í ár. Crawling Blue gav út fløguna The Well 28. mars í ár. Útgávukonsertin, sum var fyri fullsettum Norðurlandahúsið, varð tikin upp, og bólkurin hevur síðani arbeitt eina tíð við at klippa og seta tilfarið saman. Tá bólkurin eisini arbeiðir við at fáa í lag eina konsertferð, er eitt lag lagt út á youtube, so tónleikastevnufyriskiparar kunnu síggja, hvat bólkurin hevur at bjóða. Teir í Crawling Blue siga, at ætlanin er at geva DVD'ina út í ár.

## Jóhan Páll heldur fram sum formaður

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur nú skipað seg, og Jóhan Páll Joensen heldur fram sum formaður. Á nevndarfundi í dag skipaði nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag seg við Jóhan Páll Joensen sum formanni og Kristoffur Laksá sum næstformanni. Hetta er sostatt sami formansskapur sum áðrenn ársaðalfundin 12. juni. Í nevndini sita annars Bergur Poulsen, Magni Arge, Jón Danielsen, Jóhanna á Bergi og Meinhard Jacobsen.

# Hanstholm Havn útbyggjast fyri eina milliard

**Havnin í Hansthom, sum Norröna siglir til part av árinum, skal nú útbyggjast. Talan er um eina milliardaætlan, ið skal seta Hanstholm Havn á heimskortið**

VINNA

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Fyrr í mánaðinum løgdu umboð fyri Hanstholm Havn fram eina ætlan fyri víðari menning, sum bæði stílar høgt og er ein av-bjóðing við íløgum. Um øll ætlanin skal førast út í lívið, verður talan um íløgur á til samans eina milliard krónur. Havnin metir tað sjálv vera gjørligt at fíggja 60 prosent av íløgunum, meðan ES og danski staturin væntast at koma við hinum 40 prosentunum.

- Tá ætlanin er liðug, kemur Hanstholm Havn veruliga á heimskortið sum ein havn, har fiskivinna enn er ein hornasteinur, segði Poul Arne Jensen, formaður fyri havnastýrið.

Stjórin í Hanstholm Havn, Birgitte Juul, greiddi frá, at havnin framyvir skal byggja sítt virksemi á trý ting. Tað eru fiskivinna, góðs- og ferðafólkasigling, umframt ein satsningur upp á umhvørvi og orku. Har í liggur, at nýggju molarnir skulu nýtast til bæði vind-myllur og vatnorkuverk.

Fyri føroyingar er tað serliga áhugavert at so stór útbygging verður framd í hesi havnini júst nú. Í november, júst áðrenn bjargingina av Smyril Line tann 8. november 2008, boðaði leiðslan í Smyril Line frá tann 6. november 2008, at Norröna framyvir bert fór at sigla til Hanstholm summarmánaðirnar, og at tey heldur valdu at sigla til Esbjerg hinar tríggjar ársfjórðingarnar.

Eftir tíðarætlanini verður útbyggingin gjørd í tveimum stigum frá 2011 til 2016. Fram til 2011 skal arbeiðast við fígging, projektering og eini røð av frumkanningum.



*Norröna silgir eftir bjargingina av Smyril Line bert til Hanstholm summarmánaðirnar. Henda havnin skal nú útbyggjast fyri eina milliard krónur*

# Húsagangir og kvotukvett orsøk til uppsagnir

**MEST váttar at talan er um 40 ársverk, ið verða niðurløgd á Skála Skipasmiðju. Húsagangir í flotanum, niðurskurður í svartkjaftakvotuni og mist arbeiði til Íslands eru millum orsøkirnar til nógv minkaða virksemið, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri**

UPPSAGNIR

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Hjá MEST var nógv virksemi í tíðini, meðan tvey nýggj skip vórðu smíðað á Skála. Bygnaðurin varð tá tillagaður hesum virksemi, bæði tá ið talan var um teknistovur, keypsdeild, fyrisiting og tímalønt fólk.

Upprunaliga var ætlanin hjá Thor, sum lat hesi skip smíða á Skála, at fýra skip skuldu byggjast, men hóast stórur tørvur er á tílíkum skipum, var møguleiki ikki at fáa neyðugu fíggingina í Føroyum.

Á vári 2008, tá ikki fleiri nýbygningar vóru í væntu, varð stórt arbeiði gjørt fyri at fáa føroysk og útlendsk skip at koma til MEST at gera umvælingar og viðlíkahaldsarbeiði.

- Farið varð eitt nú til Íslands og Russlands at selja okkara tænastur, og arbeitt varð fyri at fáa føroysku skipini at gera arbeiðið í Føroyum heldur enn at fara av landinum. Vit fingu onkur íslendsk skip at koma á sumri 2008, men øll vita vit, hvussu gongdin hevur verið í Íslandi síðan tá, og heldur enn at vit hava fingið íslendsk skip at koma til Føroyar, so hava íslendsku skipasmiðjurnar givið føroyskum skipum tilboð, sum torført hevur verið at kappast við. Sostatt hava vit mist arbeiði til Íslands heldur enn at fáa arbeiði haðani, staðfestir Eyðfinn Egholm, stjóri í MEST.



*Millum lítið og einki arbeiði er eftir at gera á Skála Skipasmiðju. Støðuga niðurgongdin er orsakað av húsagangum í fiskiflotanum, niðurskurði av svartkjaftakvotuni og øktari prískapping úr Íslandi, sigur stjórin í MEST, Eyðfinn Egholm*

(savnsmynd)

### Styrkt samband við Russland ikki nóg mikið

Stjórin í MEST, Eyðfinn Egholm, vísir á, at MEST hevur styrkt sambandið við Russland, men at tað enn ikki munar nóg mikið í mun til tann kapasitet, MEST hevur til umvælingar og viðlíkahald av skipum.

Harafturat sigur hann at húsagangir í føroyska flotanum hava havt sína ávirkan.

- Fleiri skip í føroyska flotanum eru farin á húsagang, og tá tey so vóru endurreist við nýggjum eigarum, hava fleiri av teimum ynskt at fara av landinum at gera umvælingar og umbyggingar, hóast okkara tilboð oftast hava verið kappingarfør, sigur Eyðfinn Egholm.

### Kunnu als ikki halda áfram

Eisini niðurskurðurin í svartkjaftakvotuni verður nevndur sum ein av orsøkunum. Hesin hevur havt við sær, at fleiri av størstu trolarunum eru seldir av landinum.

- Við endan av árinum 2008, tá vit sóu hvønn veg tað bar, gjørdu vit eina tillaging av fólki svarandi til umleið 10 prosent av samlaða kapasitetinum. Í januar, februar og mars í 2009 var sera lítið virksemi, meðan nakað av arbeiði var í apríl og mai. Við útgangsstøði í teimum arbeiðum, vit kenna og við atliti til gongdina í føroyska flotanum og føroyska samfelagnum sum heild, síggja vit nú, at vit als ikki kunnu halda áfram við teirri manning, vit hava í dag. Um hesi fyritøku skal verða lív lagað, eru vit noydd til at gera enn eina tillaging av bygnaði og fólki, og talan er nú um 40 ársverk, ið verða niðurløgd, staðfestir Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST.